# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Summarfrítíðaravloysarar

**Sjúkrarøktarfrøðingar**
**Pleygarar**
**Heilsurøktarar**
**Heilsuhjálparar**
**Sjúkrahjálparar**
**Ljósmøður**
**Bioanalytikarar**
**Radiografar**

Søkt verður eftir starvsfólki til fulltíðar og parttíðar feriuavloysarastørv í skiftandi vaktum í tíðarskeiðinum 1. mai 2009 til og við 31. august 2009.

**Økini, ið tørva summarfrítíðaravloysarar í ár, eru:**
- hæmodialysu ambulatorium
- hjartadeild
- barnadeild, børn 0-14 ár
- føðideild/præmaturstova og ljósmøðratænastan
- intensiv deild og skaðastova
- operatiónsdeild (við tilkallivakt frá bústaði/kamari)
- kirurgisk, medisinsk og psykiatriskar seingjadeildir
- kommunulæknaskipanin
- rannsóknarstovan og ambulatorium
- røntgendeildin (við tilkallivakt frá bústaði/kamari)

Vit ynskja ágrýtin starvsfólk við dirvi, góðum samstarvsevnum og evnum til at virka sjálvstøðugt.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja 304500 til leiðandi sjúkrarøktarfrøðing:
- Nainu Túgvustein, Skurðdepilin, lokal 5102, lsnaitu@ls.fo
- Ása Poulsen, Medisinski depilin, lokal 6102, lsasapo@ls.fo
- Bergit Weihe, Psyk. depilin, lokal 4102, lsberwe@ls.fo
- Eyðfríð L. Jacobsen, leiðandi ljósmóðir, lokal 5301, lseydja@ls.fo
- Ivy Hansen, leiðandi bioanalytikari, lokal 5601, lsivyha@ls.fo
- Ragna Reinert, deildarleiðari á røntgen, lokal 5507, lsragre@ls.fo
- Jórun Højgaard, deildarleiðari á intensiv, lokal 5811, lsjorho@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 5. mars 2009**

## Sjúkrarøktarfrøðingur til B7

Vit søkja eftir 2 fulltíðaravloysarum í skiftandi vaktum til setan 1. mars 2009 ella eftir avtalu til og við 31. august 2009. Møguleiki er fyri lægri brøki.

B7 er ein nýumvæld medisinsk deild, sum hevur hesar sergreinar: Lungnamedisin, nefrologi, hæmatologi, apoplexi, rheumatologi og onkologi. Á B7 er tvørfaklig konferansa hvønn morgun. Tvørfaklig menning við undirvísing og skeiðvirksemi innan serøkini heldur fram. Aðrar áhugaverdar avbjóðingar, sum liggja fyri framman, verður implementering av THS.

Í samband við umvælingar verða sjúklingar og starsvfólk flutt á aðra deild frá mai til nov. 2009.

**Arbeisðuppgávur í høvuðsheitum**
- røkt og viðgerð til sjúklingar innan áðurnevndu sergreinar

**Krøv til umsøkjaran**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga innan medisinsku sjúkrarøktina
- góð tvørfaklig samstarvsevni
- teldukunnleiki

**Vit kunnu bjóða**
- innleiðslu
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samstarv
- ávirkan á fakliga menning
- eitt dynamiskt og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi við nógvum avbjóðingum

Fyrimun hava umsøkjarar við kliniskum royndum innan sergreinarøktina og viðgerðirnar innan serøkini á deildini.

Nærri fæst at vita um størvini við at ringja 304500 til Jónu Sigmundardóttir, deildarleiðara á B7, lokal 6067, ella til Ásu Poulsen leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102.

**Umsóknarfreistin er 23. februar 2009 kl. 12.00**

## Starvsfólk til Sjúkraflutningstænastuna

Søkt verður eftir fólki til 2 føst fulltíðarstørv til setan 1. mars 2009 ella eftir avtalu.

Sjúkraflutningstænastan er ein deild við nógvum ymiskum uppgávum. Ein av høvuðsuppgávunum er at verða ein bráðfeingishjálp í samband við lívbjargandi arbeiði. Harnæst er uppgávan flutningur av sjúkum og skaddum fólkum og fólkum, ið eru rørslutarnað. Eisini hevur Sjúkraflutningstænastan ábyrgd av øllum portørarbeiði, ið er á Landssjúkrahúsinum. Alt hetta setir stór krøv til starvsfólkið, sum mangan kemur at arbeiða undir serstøkum umstøðum.

Starvsøkini hjá Sjúkraflutningstænastuni fevna um Streymoy, Eysturoy, Vágar og Sandoy. Her starvast í løtuni umleið 35 fólk. Deildin hevur 14 bilar, íroknað 10 sjúkrabilar. Vaktsentralurin, ið hoyrir til deildina, er saman við sjúkrabilunum á hvørjum starvsøki mannaður alt samdøgrið.

Ábyrgdarøkini eru Tórshavn, Vágar og Eysturoy í skiftandi vaktum. Tann, ið settur verður, fær neyðuga upplæring í samband við starvið.

Nýsett starvsfólk skulu hava grundskeið/upplæring í uml. 14 dagar, áðrenn tey kunnu virka sum hjálparfólk í sjúkrabilinum. Tey skulu hava vegleiðing av einum viðgerða og hava møguleika fyri øðrum grundskeiðum, ið eru neyðug, fyri at røkja starvið til fulnar.

Sjúkraflutningstænastan krevur, at tann, ið settur verður, skal upp til eina praktiska roynd í lívbjargandi arbeiði eina ferð um árið fyri at tryggja, at tænastan livir upp til eitt dygdargott arbeiði.

**Vit vænta, at tú:**
- er tænastusinnað/ur, fyrikomandi og hevur góð samstarvsevni
- kann síggja avbjóðingar fram um avmarkingar
- hevur evni til at orða teg bæði munnliga og skrivliga
- tekur ábyrgd og arbeiðir sjálvstøðugt
- ert fús/ur til at broyta teg til nútíðina

**Førleikakrøv:**
- koyrikort til vanligan bil
- ikki yngri enn 21 ár
- rein revsiváttan
- hevur prógv í 1. hjálp
- hædd maður: minst 170cm uttan fótbúna
- hædd kvinna: minst 165cm uttan fótbúna
- maður skal kunna lyfta 50 kg yvir bringuhædd
- kvinna skal kunna lyfta 30 kg yvir bringuhædd
- likamliga sterk/ur
- heilsuváttan, váttað av lækna
- vanlig hoyrn og sjón
- telduførleiki á brúkarastøði

Í samband við starvsfólkapolitikkin og virðisgrundalagið hjá Sjúkraflutningstænastuni skal tann, ið settur verður, lúka øll krøv, ið tænastan krevur. Í hesum sambandi leggur Sjúkraflutningstænastan eisini stóran dent á trivnaða og menning.

Nærri fæst at vit um størvini við at venda sær til Jákup Nolsøe, leiðara á tlf. 304501.

**Umsóknarfreistin er 20. februar 2009 kl. 12.00**

## Ljósmóðir til Ljósmøðratænastuna

Eitt farloyvisstarv sum ljósmóðir á starvsbrøki 0,75 er leyst at søkja til setan 1. apríl/mai 2009 til og við 31. mars 2010. Møguleiki er fyri hægri brøki. Starvið fevnir um alt virkisøkið hjá ljósmøðrunum t.e. viðgonga, føðing og barsil.

**Førleikakrøv**
- Útbúgving og góðkenning sum ljósmóðir
- Gjarna kliniskar royndir innan viðgongu, føðing og barsil

**Vit ynskja eina ljósmóðir, sum**
- er jalig og luttakandi
- hevur góð samstarvs- og samskiftisevni
- sær heildina og kann arbeiða sjálvstøðugt

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Eyðfríð L. Jacobsen, leiðandi ljósmóðir, telefon 304500-5301 ella á teldupost: lseydja@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 24. mars 2009**

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.
Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:
Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn
ella við telduposti til umsokn@ls.fo







## Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

- er sjúklingurin í miðdeplinum
- eru umleið 200 seingjarpláss
- eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo